# Tvær og eina hálva millión krónur fyri hvønn slagsbróður

**So nógv kostar tað í miðal svenska samfelagnum, hvørja ferð ein maður nýtir harðskap móti konu og børnum. Hetta og mangt annað kom fram á ráðstevnuni um harðskap móti kvinnum, sum var um vikuskiftið.**

JAVNSTØÐA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Høvuðsevnið á ráðstevnuni hesaferð var heilsustøðan hjá harðskapsraktum kvinnum. Og sambært Bjørg Jacobsen, sum er skrivari hjá Javnstøðunevndini, er heilsustøðan milt sagt einki at reypa av.

- Innsavnað og viðgjørd hagtøl gjøgnum fleiri ár prógva ferð eftir ferð, at harðskapur í heiminum skapar djúpt traumatiseraðar kvinnur, sum – alt eftir, hvussu umfatandi harðskapurin er – hava ilt við at fóta sær aftur í samfelagnum, hóast tær eru so hepnar koma sær burtur úr harðskapinum. Nissan er nevniliga ikki so at sleppa av við. Ofta stinga stórir trupulleikar seg upp, eitt nú tunglindi, vantandi sjálvsálit og sjálvsvirðing, sálarligir og sosialir trupulleikar. Tað krevur langa tíð og nógv tilfeingi at byggja seg uppaftur, og verri enn so allar kvinnur makta hesa uppgávu einsamallar, greiðir Bjørg Jacobsen frá, á heimasíðuni hjá Javnstøðunevndini.

## Ymisk sløg av harðskapi

Og hon lýsir harðskap soleiðis, at hann kann fevna um kropsligan, sálarligan, materiellan, fíggjaligan harðskap og talan kann eisini vera um hóttanir, neyðtøku og insest. Materiellur harðskapur er, tá maðurin brýtur ting og ognir, og fíggjarligur harðskapur er, tá annar parturin tekur ræðið á inntøkuni ella pengabrúkinum hjá hinum ella noyðir viðkomandi at stovna skuld.

## Børnini harðast rakt

Ikki bara kvinnurnar líða undir harðskapinum; eisini børnini verða hart – kanska enn harðari – rakt, sigur Bjørg, sum vísir á, at øll gransking vísir, at børn, sum vaksa upp í harðskapsraktum heimum, eru í munandi størri vanda fyri at enda í somu støðu sum vaksin.

- Mynstrið endurtekur seg við, at tey antin sjálvi fara at brúka harðskap sum samskiftisamboð, ella tey rena seg lúkst í føvningin á einum, sum fyrr ella seinni smyr tey av – so ella so, sigur hon og vísir á eitt ítøkiligt dømi, sum kom fram á ráðstevnuni.

- Eitt livandi dømi var Odile Poulsen, sum luttók á ráðstevnuni. Odile Poulsen er rithøvundi og "yvirlivari av incest og prostitutión", sum hon valdi at kalla seg. Hon rúnarbant allan salin við at fortelja um barndóm sín, sum førdi hana út í prostitutión, og hvussu nógva orku hon hevði brúkt til at koma sær burtur úr trupulleikunum og liva eitt nøkulunda normalt lív, sigur Bjørg.

## Høgur prísur

Og Bjørg heldur fram, við at greiðia frá um aðrar avleiðingar, sum standast av harðskapi móti kvinnum.-

- Umframt menniskjasliga prísin, sum er trupul at máta, hevur harðskapurin stórar fíggjarligar avleiðingar. Katarina Weinehall á Umeå Universitet í Svøríki førdi fram á ráðstevuni, at hvør



*Børn, sum vaksa upp í harðskapsraktum heimum, eru í munandi størri vanda fyri at enda í somu støðu sum vaksin.*

einstakur maður, sum nýtir harðskap móti konuni/sambúgvanum/børnunum, kostar svenska samfelagnum heilar 2,5 mió. svenskar kr. Henda upphædd verður brúkt til at rætta upp á fylgjurnar hjá ofrunum, tá læknar, sjúkrasystrar og heilsustarvsfólk annars, sálarfrøðingar, terapeutar, pedagogar, sosialráðgevarar, skrivstovufólk, juristar, politi og mong onnur verða sett í sving, ofta yvir eitt langt tíðarskeið. Sostatt eru allir samfelagsborgarar við til at fíggja harðskap hjá (summum) monnum – og í ráðstevnuniðurstøðuni verður retoriskt spurt: vilja vit framvegis tað?

**FAKTA**

Ráðstevnan Nordiske Kvinder mod Vold varð hildin fyri 13. ferð í ár, og hesa ferð í Føroyum vikuskiftið 25-27. august. 170 luttakarar úr Svøríki, Noregi, Danmark, Føroyum, Íslandi og Grønlandi vóru við. Luttakararnir umboðaðu ymsar stovnar og felagsskapir, sum arbeiða ímóti harðskapi í familjum.

# Havið dirvi at spyrja

**Tað tykist, sum starvsfólk í tí almenna eru bangin fyri at spyrja eina bukaða kvinnu, um hon hevur verið fyri harðskapi, tí tey vita ikki, hvat tey skulu gera, um kvinnan svarar ja. Hetta var ein av boðskapunum hjá svenska granskaranum Katarina Weinehall á ráðstevnuni um harðskap móti kvinnum.**

HARÐSKAPUR
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Katarina Weinehall, er granskari við Umeå universitet í Svøríki, og hon var ein av fyrilestrarhaldarunum á ráðstevnuni um harðskap móti kvinnum, ið var um vikuskiftið.

Hon tosaði um kostnaðin av, at ein kvinna er harðskapsrakt, bæði heilsuliga kostnaðin og kostnaðin í krónum og oyrum. Katarina Weinehall hevur gjørt sínar kanningar í Svøríki, men hon sigur, at sum við so nógvum øðrum evnum, líkist harðskapurin ímóti kvinnum í flestu londum í Evropa og harðskapurin verður eisini viðgjørdur á sama hátt í hesum londum.

- Tað at vera útnyttað og at vera fyri harðskapi hevur avleiðingar fyri allar kvinnur, sigur Katarina Weinehall.

- Tað kostar henni nógv, bæði tá hugsað verður um hennara heilsu og trivnaðin.

Tá ein kvinna er fyri harðskapi, setur tað mørk fyri hvat hon ger, hon broytist og blívur sálarliga sjúk. Hon trýr bara uppá tað negativa og følir sjálv skuld og ábyrgd av síni støðu. Hon verður drenað fyri orku og verður avbyrgd frá umheiminum og missir samband við familju og vinir. Hon hvílir aldri, kroppurin er spentur, hon svevur illa og tað kann lættliga føra til magasár.

Um harðskapurin varðar við, verður kvinnan kroniskt sjúk. Nógvar fáa depressiónir og sjálvmorðstankar. Fylgjan fyri nógvar kvinnur er posttraumatiskt stessyndrom. Men hesin parturin av kostnaðinum, ið hevur við likamligu og sálarligu heilsuna hjá kvinnuni at gera, er sera ringur at máta.

## Peningaligar avleiðingar

Tann partur av harðskapinum, ið hevur ein stóran fíggjarligan kostnað fyri samfelagið, er lættari at máta.

Katarina Weinehall hevur í sínum kanningum roknað út, hvat tað kostar tí svenska samfelagnum, tá ein kvinna er fyri harðskapi. Roknað við eru prísurin fyri at vera kannað hjá læknanum, fyri sjúkrasystrar, fyri sálarfrøðingar, sosialráðgevarar og øll hini starvsfólk, ið hava við eina harðskapsrakta kvinnu at gera. Kostnaðurin er sera høgur fyri samfelagið. Hvør maður ið fremur harðskap kostar svenska samfelagnum 2,5 milliónir svenskar krónur.

- Kostnaðurin verður nógv hægri enn neyðugt, tí myndugleikarnir ikki gera nakað fyri at fáa hann niður, sigur Katarina Weinehall.

- Orsøkin til at kostnaðurin fer so nógv upp, er at myndugleikarnir vita ov lítið um harðskap, og at samstarvið millum ymisku myndugleikarnar og ymisku partarnar av heilsuverkinum er ov vánaligt. Kvinnan verður send víðari úr einum stað í annað og fær tí ikki ta hjálp, hon hevur brúk fyri.



*Katarina Weinehall*

## Set inn fyrri

Katarina Weinehall heldur, at kostnaðurin kann fáast niður, við at harðskapurin verður steðgaður fyrri. Eitt nú við at geva starvsfólkinum í tí almenna eina útbúgving viðvíkjandi harðskapi. So høvdu starvsfólkini í heilsuverkinum, sosialu myndugleikunum og hjá løgregluni vita, hvat tey skulu gera, um tey hava illgruna um, at ein kvinna er fyri harðskapi.

- Fyrsta uppgávan hjá myndugleikunum er, at øll starvsfólk mugu hava dirvi til at spyrja kvinnuna »hevur tú verið fyri harðskapi? « Tað tykist, sum starvsfólkini eru bangin fyri at seta spurningin, tí tey vita ikki, hvat tey skulu gera, um kvinnan svarar ja. Men tey hava misskilt nakað, tí tey noyðast ikki at duga alt, tí kvinnan veit sjálv best, hvørja hjálp hon hevur brúk fyri. Greiðir Katarina Weinehall frá.

- Harafturat má samarbeiðið ímillum stovnarnar í tí almenna gerast betri, so teir vita, hvør hevur ábyrgdina av einum ávísum øki. Á tann hátt kunnu vit sleppa undan, at kvinnan verður send ímillum tey ymisku støðini, so hon kann vera viðgjørd á einum staði, sigur Katarina Weinehall.